# Nólsoyingar vóru ovfarnir av sær sjálvum

***10–mannafør:*** *Tað var ikki fyrrenn teir fóru um málstrikuna, at róðrarmenninir umborð á vinnandi bátinum sóu aftur á Havnarbáti*



*Nólsoyingar vóru ovurfegnir, tá teir gjørdust greiðir um, at tað hevði eydnast teimum at vinna eystanstevnuróðurin. Á myndini síggjast teir takka hinum bátunum fyri róðurin*
***Mynd: J. Jacobsen***

Tað var stórt brúdleyp í Nólsoy leygarkvødið. Borðreitt var fyri hálvt fjórða hundrað fólkum á flakavirkinum. Lagið var í topp, tí stoltleikin hjá bygdini, tíggjumannafarið Nólsoyingurin, fyrr á degnum hevði vunnið hørðu kappingina á Skálafjørðinum. Undir borðhaldinum trinu vinnararnir inn í veitsluskálan. Teir vórðu móttiknir sum tær hetjurnar, sum tær vóru fyri bygdarfólkinum:

– Hetta var eitt fantastiska stórt upplivilsi. Bæði at vinna og at koma aftur til Nólsoyar. Bygdin er ikki so stór. Øll kenna seg á onkran hátt knýtt at okkum, sum rógva, og tá vit komu út aftur leygarkvøldið, vóru øll fløgg í bygdini vundin á stong. Soleiðis hevur tað altíð verið í Nólsoy. Kappróðurin er so at siga einasta ítróttin, sum bygdin luttekur í. Tað verður heilt nógv tosað um kappróður, og tað er ikki frítt, at útvarpsupptøkurnar verða spældar umaftur og umaftur. Nú hava vit fingið kopi at sjónvarpsupptøkuni av róðrinum á Skálafjørðinum leygardagin í síðstu viku, og tann upptøkan verður tað hugt at umaftur og umaftur.

Tað er formaðurin á vinnandi tíggjumannafarinum á Skálafjarðarstevnuni, sum vit práta við. Brian Hansen er annar av lærmonnunum. Hann sigur, at í ár høvdu teir ætlað rættuliga at verið við í kappingini um oddasessin:

– Vit hava fingið nýggjan bát, og spenningurin hevur verið stórur. Á norðoyarstevnu høvdu vit ætlað okkum at verið við í stríðnum um fremsta plássið, men ta ferðina gekk tað ikki. Vit hildu sjálvir, at vit vóru í so títtir við árini í Klaksvík. Á Skálafjørðinum løgdu vit okkum eina við at rógva meiri seigan, og tað eydnaðist væl, men tað var ikki fyrrenn á sjálvum málinum, at tað gjørdist okkum greitt, at vit høvdu vunnið, sigur Brian Hansen.

### Framúr endaspurtur

Í Runavík eru møguleikarnir framúr góðir at fylgja við í kappróðrinum. Líkindini vóru av teimum bestu, tá 10–mannaførini, sum avgjørt vístu mest spennandi kappingina, komu skúmandi framvið havnarlagnum. Havnarbáturin var eina heila bátslongd fremstur, tá tað bara vóru stórt hundrað metrar eftir á mál. Vestmenningar tóktust ikki at hava meiri í sær, Eysturoyingurin var ongantíð við í kappingini um fremsta plássið, og tá tað var farið undir endaspurtin bendi einki á, at Nólsoyingurin skuldi vinna.

Men so var tað, at tað í eygunum á teimum, ið stóðu og hugdu at, tóktist sum um Havnarbáturin stóð stillur, meðan Nólsoyingurin so at siga fekk luft undir veingirnar. Á eitt hundrað metrum megnaðu nólsoyingar at taka Havnarbátin við tveimum bátslongdum. Hetta skal skiljast soleiðis, at Havnarbáturin var eina bátslongd frammfyri Nólsoyingin stutt úr málinum, og á málinum var Nólsloyingurin eina bátslongd frammanfyri Havnarbátin.

– Tá vit fóru um málið, leyp stýrimaðurin hjá okkum beinanvegin upp. Tá gjørdist eg greiður yvir, at vit ivaleyst høvdu vunnið. Undir róðrinum sá eg ongantíð Havnarbátin. Eg siti á lærinum, og Havnarbáturin gekk tíðliga so mikið frá okkum, at eg ikki sá aftur á stýrimannin hjá teimum. Tað var ein veldug kensla at finna út av, at hesa ferð vóru tað vit, sum høvdu vunnið, sigur Brian Hansen.

### Báturin framúr

Vestmenningurin vann kappróðurin á norðoyarstevnu, og umborð á Nólsoyinginum høvdu teir roknað við, at vestmenningar fóru at geva teimum størstu mótstøðuna. Vestmenningurin plagar ikki at koma so sannførandi frá startinum. Heldur plagar tað at vera soleiðis, at teir so at siga koma sníkjandi aftanífrá. Soleiðis var tað eisini á norðoyarstevnu, tá tað var Vestmenningurin, sum í endaspurtinum tók Havnarbátin.

Á Skálafjørðinum bendi nógv ta fyrstu løtuna á, at Vestmenningurin fór at vinna. Teir fingu betri start, enn teir ofta plaga at fáa, og so skuldi tað verið lag á manni. Men Vestmenningurin slapp ongantíð framum Havnarbátin og Nólsoyingin, og á tí mesta av tvey túsund metra teininum var stóra broytingin tann, at Havnarbáturin stútt og støðugt gekk eitt sindur frá hinum bátunum.

So var tað, at Nólsoyingurin gjørdi hol í sjógvin. Endaspurturin hjá teimum var so sannførandi, sum tað sjáldan sæst, og á málinum var eingin ivi um, hvør hevði vunnið.

Hetta var fyrsta ferðin síðani á jóansøku í 1991, tá tað varð kappast á Tvøroyri, at Nólsoyingurin vann. Í áttati árunum var Nólsoyingurin stinnur. Tá vunnu teir FM seks ferðir: í 1981, 1982, 1985, 1986, 1988 og í 1989.

– Vit hava gjørt ikki so lítið við venjingina tey seinnu árini, men tey bæði seinastu árini hevur ikki verið hugsningur um at taka Eysturoyingin. Vit ásannaðu, at um vit skuldu hava nakran møguleika, so skuldu vit fáa ein nýggjan bát. Hann fingu vit. Á norðoyarstevnu var tað eitt vónbrot, at tað ikki hilnaðist betur, men hesa ferð smakkaði sigurin okkum sera væl, sigur Brian Hansen.

### Vita hvat tað snýr seg um

Nólsoy er ein lítil bygd. Men kortini eru tað fyri tað mesta nólsoyingar, sum manna 10–mannafarið. Allir róðrarmenninir uttan tveir eru nólsoyingar. Teir flestu búgva og arbeiða í høvuðsstaðnum. Nólsoyingurin stendur í neystinum hjá róðrarfelagnum á Argjum. Tá teir leygarkvøldið fóru út til Nólsoyar í brúdleyp, har teir vóru heiðraðir sum tær hetjurnar, sum teir kendust at vera millum bygdafólkið, lótu teir bátin vera eftir í neystinum á Argjum.

Sigurin kendist sum krúnan á verkinum eftir eina langa og strævna fyrireikingartíð. Nólsoyingar fingu nýggja bátin, sum Sámal Hansen, ið rør við Eysturoyinginum hevur smíðað, fyrst í februar. Síðani fóru teir at mála, sproyta og gera alt tað, sum skal til, tá ein nýggjur bátur skal gerast klárur. Fyrst í apríl fóru teir undir venjingina við gamla Nólsoyinginum. 22. apríl flotaðu teir nýggja bátin. Teir vóru ikki við á bygdarstevnuni á Skála. Í Klaksvík gekk tað ikki so, sum teir høvdu ætlað sær, men á Skálafjørðinum gekk undan.

Hjá teimum flestu var talan um fyrsta sigurin í kappingini millum 10–mannafør. Størri parturin av manningini hevur róð við Nólsoyinginum síðani 1998. Fýra eru fyrsta árið við Nólsoyinginum, men teir hava allir róð kapp árini frammanundan. OInkur hevur fyrr verið við gamla Nólsoyinginum, og onkrir hava róð við bátunum hjá Havnar Róðrarfelag.
Tað hevur verið nevnt, at tit bíðaðu við at gera bart, inntil tað bara var ein lítil teinur eftir á mál. Var talan um eitt taktistkt vælaverk á Skálafjørðinum?
– Vit drivu á alla tíðina, og vit spurtaðu, sum vit plaga at gera. At tað hesa ferð hilnaðist so óføra væl, man bæði hava havt nakað við róðurin hjá okkum at gera og við róðurin hjá hinum at gera. Líkindini vóru góð, og umstøðurnar hjá øllum vóru sera líkar, svarar Brian Hansen, bátsformaður umborð á Nólsoyinginum, sum fyri fyrstu ferð í níggju ár var fyrstur á mál í einum FM kappróðri.

jh

Yngd

Nr. 22 2000 SOSIALURIN

# Yngd ynskir øllum eitt gott summar




He-hehe